# G! eigur lívið í Boys in



G! MINI

*Bjørk K. Olsen*
*bjork@sosialurin.fo*

– Vit fingu okkara startpunkt á G! Festivalinum, sigur Pætur Zachariasson, forsangarin í Boys in a Band. Bólkurin framførdi á G! fyrstu ferð í fjør, har kanónin skeyt startkúluna, og teir fóru til Íslands. Úr Íslandi fóru teir víðari út í heim og hava síðan verið á nøkrum av størstu, altjóðu festivalunum. Á G! MINI fara teir at geva festivalinum aftur, tá teir ókeypis yvirtaka pallin í Gøtu komandi leygarkvøld.

Í 2002 tvey varð fyri fyrstu ferð skipað fyri G! Festivalinum. Tónleikasamtakið GRÓT skipaði fyri honum, og festivalurin var bara í ein dag. Festivalurin er tískil voksin við rúkandi ferð seinastu fimm árini. Festivalurin bleiv tveir dagar, og størri, kendir og útlendskir bólkar fóru at framføra á sandinum í Gøtu. Seinastu tvey árini hevur G! Music skipað fyri festivalinum, men í fjør fór tað fíggjarliga út um ræðið. G! Music fór at skylda hálvar fimm milliónir krónur, og framtíðin hjá tónleikaumhvørvinum í Gøtu fór at myrkna.

G! festivalurin hevur seinastu fimm árini givið tónleikarum og bólkum, kendum sum ókendum, pall at stíga á at gera tað, teimum dáma best. Í ár fara føroysku bólkarnir at geva aftur, tá teir ókeypis framføra í vikuskiftinum, tá tvíburðatiltakið, G! MINI, verður í Gøtu. G! Festivalurin hevur gjørt nógv burtur úr at framføra føroysku bólkarnar fyri útlendskum kontaktpersónum og fjølmiðlum, og hesum takkar Boys in a Band fyri.

## G! gav Boys in a Band møguleikan

Boys in a Band kappaðust við tónleikabólkum úr øllum heiminum, tá teir vunnu Global Battle of the Bands í 2006. G! Festivalurin varð tó onkursvegna startpunktið í tónleikayrkinum hjá bólkinum, greiðir Pætur Zachariasson, forsangari í Boys in a Band, frá. Boys in a Band framførdu fyri fyrstu ferð á G! Festivalinum í fjør, har teir á fyrstani tíð hitta manegarin, teir hava í dag.

## G! sendi teir til Íslands

G! Festivalurin hevði eina avtalu við íslendska festivalin, Island Airways, har teir skifta um bólkar, og G! Festivalurin valdi, at Boys in a Band skuldi fara til Íslands at framføra.

– Tað hevur ótrúliga nógv at